

**TOYOTA AVENSIS 2,0, AUT.** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** UA 748 **Km:** 130.000
**Árgangur:** 08.06.98 **Seinast sýnaður:**

**Kr. 108.000,-**



**TOYOTA CAMRY 3.0 GL SEDAN AUT** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** ER 235 **Km:** 94.000
**Árgangur:** 12.04.00 **Seinast sýnaður:** 09.11.05

**Kr. 165.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,3 111-SERIA**

**Skrásetingarnr:** TN 455 **Km:** 95.000
**Árgangur:** 12.05.99 **Seinast sýnaður:** 18.09.06

**Kr. 65.000,-**



**CITROEN XSARA 1,6 STW** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** AK 361 **Km:** 32.000
**Árgangur:** 01.01.02 **Seinast sýnaður:** 01.03.06

**Kr. 108.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,9 D LINEA TERRA STW** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** VU 929 **Km:** 99.500
**Árgangur:** 04.07.01 **Seinast sýnaður:** 21.04.05

**Kr. 88.000,-**



**NISSAN PRIMERA**

**Skrásetingarnr:** HN 398 **Km:** 164.000
**Árgangur:** 01.01.97 **Seinast sýnaður:** 05.08.06

**Kr. 38.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 TD** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** SU 198 **Km:** 160.000
**Árgangur:** 26.08.98 **Seinast sýnaður:**

**Kr. 85.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,3 XLI SEDAN**

**Skrásetingarnr:** F 51457 **Km:** 250.000
**Árgangur:** 19.04.95 **Seinast sýnaður:** 23.08.05

**Kr. 19.000,-**



**KIA CARENS 2,0** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** TE 148 **Km:** 47.000
**Árgangur:** 09.09.03 **Seinast sýnaður:** 09.09.03

**Kr. 128.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 2,0 LINEA SOL SED** 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr:** NL 142 **Km:** 165.000
**Árgangur:** 21.02.03 **Seinast sýnaður:** 21.02.03

**Kr. 128.000,-**

Lagalig fígging fæst til brúktu bilarnar

6 mánaða garanti

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, í eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F

Fyrirvarni ver ur tikið fyri møguligum prentvillum.


# Løgmaður skal svara Høgna

**Tað avgjørdi løgtingið fríggjadagin, at løgmaður, Jóannes Eidesgaard, skal svara tveimum fyrispurningum frá Høgna Hoydal, sum snúgva seg um skattalættan. Tveir fyrispurningar, sum herfyri vórðu tiknir av skránni**



*Jóannes Eidesgaard, løgmaður*

**POLITIKUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyri góðari viku síðani setti Høgni Hoydal løgmanni tveir munnligar fyrispurningar, um sosialu og búskaparligu avleiðingarnar av skattalættanum.

Løgmaður sýtti fyri at svara spurningunum, og vísti Bárð Nielsen, tí tað spurningarnir vóru um skatt, og tað mátti landsstýrismaðurin í fíggjarmálum svara fyri.

Løgtingsformaðurin hesa løtuna fyrispurningurin varð reistur, var Óli Breckmann. Hann var samdur við Jóannes Eidesgaard, og gjørdi hann av, at spurningarnir ikki skuldu svarast og heldur onki kjak skuldi vera.

Hesa avgerð hevur Høgni Hoydal síðani kært, og eisini hevur hann sent løgtinginum munnligu fyrispurningar skrivliga. Fríggjadagin avgjørdi løgtingið so, at løgmaður skal svara Høgna Hoydal upp á hesar spurningar.

Við Útvarpið í gjár segði Høgni Hoydal, at hann heldur hevði ynskt at fingið munnligt svar upp á hesar fyrispurningar, tí talan er um aktuell evni, men at hann eisini sær hetta sum eina ásannan av, at løgtingið heldur tað var rætt, at løgmaður skal svara hesum spurningum.

Útvarpið segði eisini, at Høgni Hoydal framvegis ikki hevur fingið svar upp á kæruna, um avgerðina hjá løgtingsformanninum, um at taka munnligu fyrispurningarnar av skránni.

# Sethúsaprísirnir øktir munandi í ár

**Prísirnir á sethúsum eru øktir munandi í ár í mun til í fjør, tað tykist sum um, at ein ávísur vøkstur framvegis er**

**PRÍSVØKSTUR**
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Tað sigur Føroya Sparikassi í einum skrivi á heimasíðu sínari. Hagtølini frá triðja ársfjórðingi í ár siga, at ein framhaldandi vøkstur er í sethúsprísunum, men at hesin vøkstur er nakað minni enn við ársbyrjan.

Sambært heimasíðuni hjá Sparikassanum, so er gongdin frá ársfjórðingi til ársfjórðing rættiliga skiftandi, men samanumtikið eru sethúsaprísirnir øktir munandi í 2006 í mun til 2005, og tað tykist, sum ein ávísur vøkstur framvegis er.

Vøksturin í húsaprísunum fyrst í árinum stóðst í rættiliga stóran mun av broyttum fíggingartreytum, so sum lægri renta og longri avdráttarmøguleikar. Núverandi vøksturin er fyrst og fremst orsaka av teimum bjørtu framtíðarvónum, sum stóri eftirspurningurin og virksemið í landinum hevur við sær.

Tað staðfestir Sparikassin á heimasíðu sínari. Sparikassin vísir eisini á, at í løtuni eru ongar ábendingar um, at eftirspurningurin og virksemið í samfelagnum fer at minka. Hinvegin sigur Sparikassin, at rentan er hækkað nakað í ár, og útlit eru framvegis til, at rentan kann hækka aftur. Hetta ávirkar húsaprísirnar niðureftir.

Sparikassin sigur, at um nógvu fráboðaðu byggiætlanirnar verða førdar út í lívið, so skal roknast við einari munandi øking í útboðnum av húsum og íbúðum. Hetta ávirkar húsaprísirnar niðureftir, men roknast skal ikki við einum falli í prísunum.

